LANGLESNAÐUR



# Farvæl,

- Trýstið á evropeisku mørkini fer bara at vaksa komandi árini, og vit mugu verja tað, sum vit hava bygt upp, og sum restin av heiminum vil hava lut í. Tað gera vit bara við effektivum marknaeftirliti millum Evropa og umheimin, so vit vita, hvør kemur inn og hvussu nógv, sigur Uffe Østergård, professari
Mynd: EPA/NAKE BATEV



- Hetta er byrjanin til endan fyri Evropa, soleiðis sum vit kenna tað. Tíðin, sum týðandi aktørur í altjóða politikki, kann vera farin. Uttan samstarv hava evropeisku nationalstatirnir onga tyngd og onga styrki samanborið við lond sum Kina, Russland og USA. So avgjørdur er ein tann fremsti Evropa-granskarin í kongaríkinum, Uffe Østergård, professari

# Evropa!

Les meir á síðu xx

LANGLESNAÐUR



Heini í Skorini

Tað finnast løtur í heimssøguni, tá alt stendur víðopið. Tá londini standa við eitt vegamót uttan at vita, hvagar leiðin nú skal ganga. Tá mannaættin stendur mitt í yvirgongdini frá einum gomlum heimi til ein nýggjan heim, og eingin veit, hvat tað nýggja inniber fyri okkum og okkara eftirkomarar.

Evropa stendur á einum slíkum vegamóti, sum kortini hevur verið ávegis leingi. Tað heldur í øllum førum professari og søgufrøðingur Uffe Østergård, sum hevur brúkt bróðurpartin av sínum lívi til at granska evropeiska søgu og tjóðskap, og sum serliga hevur kannað æviga spenningin ímillum tað nationala og tað internationala, ímillum nationalan suverenitet og internatioalt samstarv. Sjálvur hevur hann alt sítt lív verið ein superevropeari við heitum kenslum fyri Evropeiska Samveldinum, sum kortini hevur roynt at greina spenningarnar ímillum tey, sum ynskja meiri evropeiska integratión, og tey, sum krevja, at evropeisku statirnir skulu taka aftur tað vald og tann sjálvsavgerðarrætt, sum síðani Róm-sáttmálan í 1957 so við og við er avhendað til Brússel.

Úr telefonini í heiminum í Hobro í Norðurjyllandi skal Østergaard greiða mær frá, hví mótstøðan ímóti ES hevur vaksið seg so stóra og sterka kring alt Evropa, og hvat nú fer at henda. At 52 prosent av bretsku veljarunum søgdu nei til ES tann 23. juni er hápunktið fyri vaksandi fólksligu mótstøðuni ímóti ES seinastu mongu árini.

- Tað er ikki uttan orsøk, at kontantu boðini frá summum ES-leiðarum hava verið, at Bretland skal út úr ES ongantíð ov skjótt. Tað hevur nevniliga alstóran týdning at vísa øllum hinum londunum, at tað finst eingin løtt millumloysn. Antin er man innanfyri, ella er man uttanfyri. Um Bretland kann samráða seg til góðar og lukrativar avtalur, fara onnur lond at fylgja í fótasporunum hjá Bretlandi, og so kann ES fara í upploysn, heldur Uffe Østergård.

**Um Bretland kann samráða seg til góðar og lukrativar avtalur, fara onnur lond at fylgja í fótasporunum hjá Bretlandi, og so fer ES í upploysn**

## Eitt veikt og tannleyst Evropa

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fólkið sigur nei til víðkaða ES-integratión á fólkaatkvøðum. Serliga kom grús í maskinaríið, tá franskir og hollendskir veljarar vrakaðu uppskotið um eina ES-grundlóg í 2005, og bæði í fjør og í ár hava danskir og hollendskir veljarar eisini sagt nei til tættari tilknýti til Brússel á ymsum hermótum. Av tí at fólkaatkvøðan í Bretlandi "bara" var vegleiðandi, vita vit ikki, hvat hon í praksis fer at merkja. Men um Bretland fer úr ES, sum nýggi forsætisráðharrin Theresa May hevur lovað, er tað fyrstu ferð nakrantíð, at ein sjálvstøðug tjóð ressast frá borðinum í Brússel og takkar permanent fyri seg.

Og Stórabretland er ikki hvør sum helst. Landið er næst størsti búskapurin í ES og fimti størsti búskapurin í heiminum. Stórabretland er nógv tann sterkasta hermegin í ES. Einki annað evropeiskt land hevur betri diplomatiskt og politiskt samstarv við USA. Og uttan Stórabretland er



**ES fer framhaldandi at eksistera. Man fer neyvan at niðurleggja sjálvar stovnnarnar, sum hoyra til ES. Men tíðin sum týðandi aktørur í altjóða politikki kann vera farin. Uttan samstarv hava evropeisku nationalstatirnir onga tyngd og onga styrki samanborið við Kina, Russland, India og USA**

um londum líknandi fólkaatkvøður, serliga í Fraklandi, Hollandi, Ungarn, Grikkalandi og Póllandi.

- Hendan domino-effektin kann í longdini vera mønustingurin hjá ES og einum samlaðum Evropa, heldur Uffe Østergård, sum serliga fylgir við framgongdini hjá nationalkonservativu flokkunum í evropeisku "kjarnulondunum", sum hann málber seg.

Tað vil siga teir flokkarnir, sum halda, at ES hevur stolið nationala sjálvsavgerðarrættin, sum ynskja ein restriktivan útlendingapolitkk og effektivt, fysiskt marknaeftirlit.

Her hugsar hann

visjónin um eitt felags evropeiskt hervald og ein felags evropeiskan uttanríkis- og trygdarpolitikk fullkomiliga avlívað. Tað einasta, sum

verjir Evropa, er NATO.

Nú krevja stórir flokkar í fleiri øðr-

- Mótstøðan ímóti ES er vorðin so stór í so nógvum londum, at felagsskapurin er doyggjandi. Man fer neyvan at niðurleggja sjálvar stovnnarnar, sum hoyra til ES. Men tíðin sum týðandi aktørur í altjóða politikki kann vera farin. Uttan samstarv hava evropeisku nationalstatirnir onga tyngd og onga styrki samanborið við Kina, Russland og USA. Tað sigur danski professarin Uffe Østergård, sum alt sítt lív hevur stuðlað ES-prosjektinum, men sum nú viðurkennir, at tíðin som stórveldi kann vera farin
Mynd: Bjarke MacCarthy







Tað er ikki ósannlíkt, at forkvinnan í høgranationala franska flokkinum Front Nationale, Marine le Pen, verður nýggjur franskur forseti komandi vár. Le Pen vil hava Frakland úr ES og hevur lovað eina fólkaatkvøðu um hon vinnur. Her er hon avmyndað í ES-parlamentinum, sum hon er so nógv ímóti
Mynd: EPA/PATRICK SEEGER

serliga um Front Nationale í Fraklandi, sum sambært meiningarkanningum kann vinna franska valið í 2017; Alternative für Deutschland í Týsklandi, sum framvegis er lutfalsliga lítil, men sum veksur við rúkandi ferð; Ukip í Bretlandi, sum er ein lítil flokkur í innanríkispolitiskum høpi, men sum var við til at mynda Brexit-kampanjuna og vinna fólkaatkvøðuna; sonevndi Frælsisflokkin hjá Geert Wilders í Hollandi, Dansk Folkeparti í Danmark og Sverigedemokraterna í Svøríki, sum allir ynskja fólkaatkvøður um tilknýtið til ES. Mest avgerandi er gongdin í Fraklandi og Týsklandi, tí hesi londini eru kjarnin í tí evropeiska prosjektinum. Uffe Østergård væntar, at hesir flokkarnir eiga framtíðina.

- Eg ynski eitt sterkt og savnað Evropa, men eg eri bangin fyri, at hesir flokkarnir longu hava fingið ov stórt vald í einstøku londunum, og at dagarnir eru taldir hjá ES, soleiðis sum vit kenna felagsskapin í dag. Eg vænti, at fólkaatkvøður koma í øðrum londum, og eg viðurkenni við beiskum smakki, at Dansk Folkeparti og aðrir nationalkonservativir flokkar høvdu rætt í, at ES-prosjektið hevur yvirhálað evropeiskar veljarar. Nú siga fólk, at nokk er nokk.

Men hvat kemur so í staðin? Hvussu fer Evropa at síggja út um 20 ár?

- ES fer framhaldandi at eksistera. Man fer neyvan at niðurleggja sjálvar stovnarnar, sum hoyra til ES. Men tíðin sum týðandi aktørur í altjóða politikki kann vera farin. Uttan samstarv hava evropeisku nationalstatirnir onga tyngd og onga styrki samanborið við Kina, Russland, India og USA. Tað er ikki uttan orsøk, at Obama inniliga ynskir, at bretar verða verandi í ES, tí hann ynskir ein stabilan og sterkan evropeiskan partnara, sum kann levera, tá á stendur.

Sambært Østergård er Evropa tannleyst uttan Bretland, og um onnur lond fylgja bretska fordøminum, hevur Evropa ongan týdning sum globalur aktørur í mun til tær stóru avbjóðingarnar, sum londini bara kunnu loysa í felag. Tað verði seg í mun til altjóða yvirgang, kríggj, veðurlagsbroytingar, flóttafólkaspurningin og transnationalan kriminalitet yvirhøvur.

Men her og nú eru komandi samráðingarnar millum ES og Bretland sannleikans tími fyri evropeiska samstarvið í longdini. Týski kanslarin Angela Merkel hevur orðað seg í bleytari vendingum enn t.d. formaðurin í ES-kommisiónini, Jean Claude Juncker. Bretland er ein stórur og virðismikil marknaður fyri týskar vørur, og ein fríhandilssáttmáli millum Týskland og Bretland hevur avgerandi týdning fyri týsk arbeiðspláss – og umvent. Hetta er tann stóra tvístøðan hjá Merkel, franska forsetanum François Hollande og øðrum evropeiskum

**Øðrumegin hava hesi londini brúk fyri Bretlandi, men hinumegin kann ES fara í upploysn, um Bretland fær ov lætt spæl, tí so kann man framprovokera eitt Frexit (Frakland), Dexit (Danmark) ella Nexit (Niðurlond)**




Sum nýggjur bretskur forsætisráðharri skal 59 ára gamla Theresa May samráðast við ES um, hvørjar avtalur skulu vera galdandi, tá Bretland fer úr ES. Á tíðindafundi í vikuni undirstrikaði fyrrverandi innanríkisráðharrin, at "Brexit merkir Brexit", og tað merkir, at hon vil hava Bretland úr ES
Mynd: EPA/CHIRS RADBURN

statsleiðarum. Øðrumegin hava hesi londini brúk fyri Bretlandi, men hinumegin kann ES fara í upployswn, um Bretland fær ov lætt spæl, tí so kann man framprovokera eitt Frexit (Frakland), Dexit (Danmark) ella Nexit (Niðurlond).

- Og hetta kann eisini vera endin á Stórabretlandi, tí Skotland og Norðurírland vilja gjarna vera partur av ES, og ein nýggj fólkaatkvøða um loysing frá Bretlandi er als ikki ósannlík í Skotlandi. Og hvat við friðarprosessini í Norðurírlandi, um Bretland fer úr ES? Ein avgerandi partur av friðaravtaluni frá 1998 var, at norðurírar kunnu velja, hvørt teir vilja hava bretskan, írskan ella dupultan statsborgaraskap. Um Bretland fer úr ES, verður hesin parturin av friðaravtaluni ómøguligur at halda, og so kann gamla og blóðugua stríðið millum loysing og samband, millum katolikkar og protestantar, kykna aftur.

## Nationalistar og sosialistar ímóti ES

Uffe Østergård væntar, at ES í longdini verður eitt leysari og minni forpliktandi samstarv millum evropeisku londini, og hann væntar, at tey ríku norðurevropeisku londini í størri mun fara at ganga egnar leiðir, og at tey suðurevropeisku londini við einum veikari búskapi velja eitt tættari evropeiskt samstarv, fyrst og fremst tí tey hava tørv á búskaparligum stuðli frá ES.

Síðani Brexit hava fleiri evropeiskir statsleiðarar tosa um at skipa eitt minni ES og eina minni detailregulerandi skipan, sum bara skal taka sær av teimum stóru, altjóða avbjóðingunum, og lata nationalstatirnar um rest. ES skal við øðrum orðum taka fatt, tá statirnir hvør sær gerast ov lítlir. Tað feita, byrokratiska systemið í Brússel skal á slankikur, men hendan parolan er als ikki nýggj. Longu í hálvfemsunum lanseraði kommissiónsformaðurin Jacques Santer slagorðið “Do less, but do it better”, og seinnu árini hevur slagorðið verið “Big on big issues, small on small ones.” Trupulleikin er bara, at eingin hevur eitt ítøkiligt boð uppá, hvat eitt minni ES í praksis merkir. Og sambært Østergård krevur tann innari marknaðurin við teimum fýra frælsunum (vørur, tænastur, kapitalur og arbeiðsmegi) umfatandi regulering úr Brússel.

Hóast Østergård ynskir eitt sterkt Evropa, sum stendur saman, gevur hann ES-kritikarum rætt í, at ES er vorðið eitt ófólksligt og elitert prosjekt, og at sjefideologarnir handan ES hava undirmett tað nationala. Østergård nevnir t.d. endurminningarnar hjá franska diplomatinum Jean Monnet, sum mangan verður roknaður sum faðirin at ES. Hann vildi ikki vita av veljarunum, tí veljarin veit jú ikki, hvat er best fyri veljaran sjálvan. Veljarin eru tey, sum blokera fyri haldgóðum loysnum. Man fær næstan assosia-

**Evropeiskir politikarar og teknokratar hava ikki spælt við opnum kortum og sagt sínum veljarum, hvat ymsu reformarnir ígjøgnum tíðirnar hava merkt fyri nationalt sjálvræði**



tiónir til upplýsta einaveldið hjá Platon.

- Evropeiskir politikarar og teknokratar hava ikki spælt við opnum kortum og sagt sínum veljarum, hvat ymsu reformarnir ígjøgnum tíðirnar hava merkt fyri nationalt sjálvræði. Fleiri av teimum stóru, revolutionerandi tiltøkunum, sum hava flutt vald úr nationalum parlamentum og til Brússel, eru meiri ella minni smuglað inn gjøgnum bakdyrnar, og veljarar og politikarar hava ikki varnast fyrr enn nógv seinni, hvussu nøkur fólk í Brússel hava revolutionerað evropeiskan politikk. Og nú kemur so ein mótreaktión, sum sameinir ytsta vinstravongin og ytsta høgravongin, heldur Uffe Østergård.

Eitt dømi er tann innari marknaðurin, sum varð skaptur í 1993. Tann innari marknaðurin hevði við sær, at vørur, tænastur, kapitalur og arbeiðsmegi kundu ferðast frítt tvørtur um landamørk. Endamálið við hesum reforminum var at skapa vøkstur í Evropa, at styrkja um kappingarførið hjá evropeiskum fyritøkum og at beina handilsforðingar av vegnum.

- Tá meginreglan um frælsu arbeiðsmegina varð innførd, hildu veljararnir, at tann innari marknaðurin bara snúði seg um handil. Men frælsa arbeiðsmegin tvørtur um landamørk var revolutionerandi í mun til útlendingapolitikk og nationalu landamørkini, sum hevur verið eitt sentralt tema í bretska valstríðnum, sigur Uffe Østergård.

Undir valstríðnum í Bretlandi og í ES-kjakinum generelt endurtaka ES-kritikarar og partar av fakfelagsrørsluni, at frælsa arbeiðsmegin, serliga úr Eysturevropa, hevur trýst lønirnar í botn hjá bretskum, fronskum og týskum arbeiðarum, og nú er stundin komin til, at evropeisku londini aftur fáa tamarhald á sínum landamørkum og verja arbeiðsfjøldina í sínum egnu heimlondum. Hinvegin sigur t.d. bretska arbeiðsgevarafelagið, at uttan tilflyting og fremmanda arbeiðsmegi hevði bretski búskapurin havt tað munandi verri.

Síðani prinsippið um frælsa arbeiðsmegi varð innført, hevur ES-dómstólurin eisini trumfað nationala lóggávu og tulka ES-lóggávu so liberalt, at hon í roynd og veru kom at umfata nógvar aðrar bólkar, t.d. umvegis rættin til familjusameining, rættin hjá lesandi tilflytarum og rættin hjá illegalum tilflytarum.

**Um vit ynskja opin landamørk internt í Evropa, mugu vit samstundis verja okkara eksternu landamørk. Tann primera uppgávan hjá einum stati er at tryggja síni landamørk og hava tamarhald á, hvør kemur inn, og hvussu nógv koma inn**

- Frí arbeiðsmegi umfataði altso nærum øll menniskju, men tað segði eingin upprunaliga. Eg sigi ikki, at ein elita í Brússel tilvitað hevur logið fyri fólkinum, men veljarar og nationalir politikarar hava ikki vitað, hvørjar avleiðingarnar vóru av øktari ES-integrasjón. Tí stríðist ES við eitt demokratiskt undirskot í dag, heldur Uffe Østergård.

Professarin í Hobro siterar fyrrverandi týska uttanríkisráðharran Joschka Fischer, sum longu í ár 2000 helt eina kenda røðu á Humboldt-universitetinum í Berlin, har hann segði, at ES er ein brakandi succés, men veljarin kennir seg snýttan, og tað mugu vit taka í álvara. Tí varð uppskotið um eina nýggja ES-grundlóg løgd út til fólkaatkvøðu í 2005, men grundlógin varð vrakað bæði í Fraklandi og í Hollandi.

Umframt nationalkonservativu renesansuna og kravið um nationalan sjálvsavgerðarrætt eru partar av vinstravonginum eisini desillusioneraðir í mun til djórið í Brússel. Suðurevropa var serliga hart rakt av fíggjarkreppuni, til dømis Spania, Italia og ikki minst Grikkaland, og øll hesi londini stríðast við høgt arbeiðsloysi, ikki minst millum tey ungu. Hetta hevur givið vinstrahallum flokkum sum Podemos í Spania og Syriza í Grikkalandi vind í seglini. Hesir flokkarnir halda, at ES er eitt ódemokratiskt prosjekt, sum svíkir tann meiniga mannin, og sum fyrst og fremst verjir áhugamálini hjá bankunum, transnationalu fyritøkunum og big business-elituni. Við øðrum orð-



Týski kanslarin Angela Merkel hevur verið varin í sínum útsagnum, síðani bretar vrakaðu ES. Um Bretland fer úr ES, men fær góðar avtalur við ES, kunnu onnur lond fylgja í somu fótasporum. Hinvegin kann Merkel heldur ikki ignorera stóra samhandilin millum Týskland og Bretland og týdningin av góðum relasjónum til næst størsta búskapin og sterkasta hervaldið í Evropa
Mynd: EPA/STEPHANIE LECOCQ

um er anti-ES rørslan ein óheilag allians millum konservativar nationalistar og indigneraðar sosialistar. Kortini er tað bara Eindarlistin í Danmark, sum tosar um beinleiðis at melda seg úr ES. Hinir flokkarnir uttast á vinstravonginum ynskja eitt annað ES, sum er minni elitert og meiri kjølfest í fólkinum.

## Byggið ein múr kring Evropa!

Tá flóttafólkastreymurin eksploderaði í 2015, vóru ES-londini tveitt út í størstu kreppuna í nýggjari tíð. Kreppan avdúkaði eina veika og máttleysa ES-skipan, har londini ikki kundu semjast um nakað sum helst. Og fyri fyrstu ferð síðani Schengen-skipanin slóðaði fyri opnum landamørkum mitt í fýrsunum, varð marknaeftirlit aftur innført í fleiri londum í fjør, t.d. millum Danmark og Svøríki og Danmark og Týskland.

Hetta var fullkomiliga óhugsandi fyri bara trimum árum síðani. Schengen-samstarvið stavar frá 1985, tá Belgia, Frakland, Vesturtýskland, Luksemburg og Holland valdu at avtaka marknaeftirlitið millum londini, so fólk og vinna kundu ferðast frítt. So við og við komu fleiri lond uppí, og í fjør vóru 26 lond við í Schengen-samstarvinum. Men tá flóttar og migrantar byrjaðu at marsjera norður ígjøgnum Evropa í fjør, brast dreymurin um eitt kontinent uttan landamørk. Knappliga fóru fólk at tosa um tað eksterna marknaeftirlitið, sum ikki var til. Ein partur av Schengen-samstarvinum var annars at verja tey eksternu mørkini, so hvørt sum fysisku internu mørkini vórðu avtikin. Hetta var partur av Amsterdam-avtaluni frá 1997, tá Schengen-samstarvið varð flutt til ES at umsita. Men síðani hendi einki. Avleiðingarnar gjørdust sjónligar í fjør, og nationalkonservativu flokkarnir fingu enn eitt høvi at vísa á, at ES er ein inkompetent skipan, sum undirgrevur nationalt sjálvræði.

Í fleiri samrøðum í donskum miðlum seinastu tíðina hevur Uffe Østergård úttalað seg ógvuliga markant um júst hendan problematikkin. Maðurin, sum alt sítt lív hevur trúð uppá opin landamørk, eftirlýsir nú eitt "Fort Europa", sum í bókstavligari merking búrar seg inni við effektivum marknaeftirliti. Uttan nakað uttanumtos hevur Østergaard argumenterað fyri, at Evropa skal senda krígsskip í Miðjarahavið, sum skulu verja evropeisku mørkini, og sum kunnu bjarga druknandi flóttum og sigla teir aftur til heimligu strendurnar. Hann hevur eftirlýst eitt sterkt hegn við píkatrái í fleiri korridorum, vaktarmonnum og vaktartornum. Man hugsar um múrin, sum Donald Trump ynskir at byggja á markinum til Meksiko. Man hugsar um múrin í Palestina. Man hugsar um Berlin-múrin undir kalda krígnum, sum skilti eystur frá vestri. Er ein múrur veruliga tann størsta visjónin, sum Østergård hevur fyri sítt elskaða Evropa?

Østergård viðurkennir, at múrurin ikki er eitt hugaligt sjónarmið. Men fyri professaran er hesin múrurin ein logisk avleiðing av heimsins gongd. Sambært ST fer fólkatalið í Afrika at tvífaldast komandi 30 árini, frá 1,2 milliardum í dag til 2,5 milliardir í 2050. Bara í Nigeria vera 400 milliónir fólk, og alt ES telur í dag 500 milliónir fólk. Prognosurnar vísa, at fólkaflytingin til Evropa úr Afrika og Asia fer at halda fram eftir kríggið í Sýria, og tí er hetta ein spurningur um demografi og um búskap.

- Um vit ynskja opin landamørk internt í Evropa, mugu vit samstundis verja okkara eksternu landamørk. Tann primera uppgávan hjá einum stati er at tryggja síni landamørk og hava tamarhald á, hvør kemur inn, og hvussu nógv koma inn. Evropa kann ikki taka ímóti øllum teimum, sum ynskja at fáa lut í evropeisku vælferðarstatunum, tí alt ov nógvir tilflytarar gerast passivir móttakarar av almennum veitingum í staðin fyri at arbeiða og rinda til felagskassan. Tað sigur seg sjálvt, at vælferðarstaturin kollapsar, tá færri og færri skulu rinda fyri fleiri og fleiri. Vit mugu verja tað, sum vit hava bygt upp, og sum restin av heiminum vil hava lut í.

Uffe Østergård harmast um, at evropeisku londini aftur hava reist múrar og marknaeftirlit ímillum londini. Tað einasta, sum kann bjarga einum frælsum og ríkum Evropa, er ein effektivur múrur, sum búrar Evropa inni og restini úti.

- Vit hava stýrt heiminum seinastu 500 árini við hervaldi, kolonisering og imperialismu. Vit eru ikki før fyri at stýra heiminum longur. Og nú ræður um at verja tað, sum vit hava.